UTTAN ÚR HEIMI

# USA fjalir fangar í Eysturevropa



*CIA-stjórin Porter Goss og ovastin fyri øllum teimum amerikonsku fregnartænastunum, John Negroponte, á veg á fund við George W. Bush, forseta í síðstu viku*

**Amerikanska fregnartænastan CIA fjalir loyniligar fangar í eysturevropeiskum londum**

FANGAR

*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Amerikanska blaðið Washington Post skrivaði í gjár, at CIA hevur fjalt fangar ymsastaðni kring heimin tey seinastu fýra árini. Talan er um fólk, sum eru undir illgruna fyri at hava samband við yvirgang.

Keldurnar hjá blaðnum hava greitt frá, at framferðin hjá CIA er so loynilig, at bara nakrir av teimum ovastu embætismonnunum vita, hvar fangarnir verða fjaldir. Frá sínum keldum hevur blaðið fingið at vita, at fangar verða fjaldir í eitt nú Teilandi, Afghanistan og í Eysturevropa.

Aðrastaðni er komið fram, at eitt flogfar hjá CIA millumlendi í Reykjavík tann 10. oktober, og at tað fór haðani til Budapest í Ungarn. Í Danmark hava fjølmiðlar skrivað, at flogfør hjá CIA hava flogið í donskum loftrúmi, og at tey seinni lendu í Slovakia, Ukraina, Russlandi, Pólandi, Kekkia og Ungarn. Sum skilst hevur CIA eisini havt eitt loyniligt fongsul á herstøðini í Guantanamo í Kuba, men tað verður sambært Washington Post ikki brúkt longur.

Sambært Washington Post hevur CIA sent meiri enn 100 fangar til slík loynilig fongsul, sum í fregnartænastuhøpi verða umrødd sum »svørt støð«, og umleið 30 teirra hava verið ella eru í eysturevropeiskum londum. Hinir eru fluttir til lond sum Egyptaland, Jordan, Marokko og Afghanistan, skrivar blaðið, sum eisini sigur seg vita, at CIA og Hvítu Húsini hava biðið amerikanskar politikarar spyrja sum minst um teir loyniligu fangarnar.

Washington Post heldur, at framferðin hjá CIA er ikki sambærilig við amerikanska lóg, og at hon stríðir eisini ímóti altjóða sáttmálum, sum USA hevur staðfest.

# Regnskógurin við Amazonas tornar upp

**Tað eru 40 ár, síðani so lítið vatn var í Amazonas-ánni sum í ár**

UMHVØRVI

*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Vanliga regnar tað einar 2.000 mm um árið miðskeiðis í Amazonas-økinum. Men í ár hevur tað verið turt tað mesta av tíðini, og veðurmenninir vænta ikki regn fyrr enn eina ferð seinni í hesum mánaðinum. Men tá byrjar tann árliga regntíðin eisini.

Tað hevur havt stórar avleiðingar fyri alt Amazonas-økið, at tað hevur regnað so lítið. Fleiri áir, sum plaga at renna í Amazonas, eru tornaðar upp, og í sjálvari Amazonas er so lítið vatn, at tað eru 40 ár, síðani áin var so lítil.

Veðurfrøðingar og umhvørvisfelagsskapir eru ósamdir um orsøkina. Summi geva tí veksandi hitanum á Jørðini skyldina og vísa á, at regnið hevur flutt seg norðureftir, tí í ár hevur tað regnað sjáldsama illa í Miðamerika og Karibiska Havinum, meðan tað hevur nógv minni regn í Brasil og Kolombia enn vanligt. Summi, teirra millum Greenpeace, halda, at skógarvinnan í Brasil eigur ein part av skyldini.

Teir flestu veðurfrøðingarnir halda ikki, at tað er nakað óvanligt við veðurlagnum í Amazonas-økinum í ár. Teir siga, at tað hevur altíð verið skiftandi við regninum har, og at hetta er als ikki fyrstu ferð, at viðurskiftini hava verið sum nú.

Men tað hevur stórar avleiðingar fyri fólkið har, at so lítið vatn er í Amazonasánni. Eitt nú plagar stórbýurin Manaus at fáa alla olju eftir ánni, men tað ber ikki til nú, og teir, sum liva av fiskiskapi, fáa ikki loyst, skrivar Reuter.

## Fangar sleppa leysir

500 fangar, sum hava sitið í tí illa gitna Abu Ghraib-fongslinum í Irak, sluppu í gjár úr fongslinum. Men tað var kortini ikki treytaleyst, tí áðrenn fangarnir sluppu út, máttu teir binda seg at lýða iraksku lógirnar og at vera góðir borgarar, sum tikið varð til. Tá teir høvdu gjørt tað, fingu teir 25 amerikanskar dollarar, eina hvíta skjórtu og eina koran við sær í part.

Eingir fjølmiðlar vóru hjástaddir, tá fangarnir sluppu út, men sambært Reuter vóru fleiri irakskir ráðharrar har. Ein nevnd, sum hevur kannað fortíðina hjá fangunum, var eisini hjástødd.

Herfyri sluppu umleið 1.000 fangar úr fongslum í Irak, men amerikanski herurin hevur framvegis einar 13.000 irakar í fongsli, og av teimum eru umleið 5.000 í Abu Ghraib. Fleiri felagsskapir hava funnist at amerikanarunum, tí sagt verður, at nógvir menn sita í fongsli, sjálvt um teir eru ósekir. Eisini fýlast altjóða felagsskapir á, at USA vil ikki lata altjóða umboð vitja fangarnar.

Abu Ghraib-fongslið gjørdist kent um allan heimin, tá myndir avdúkaðu, at amerikanararnir fóru illa við fangum har. Síðani hava amerikanska herleiðslan og iraksku myndugleikarnir lagt stóran dent á at bøta um tað vánaliga umdømið hjá fongslinum.

## Khodorkovskij í vanda

Vinmenn hjá tí fongslaða russiska ríkmanninum Mikhail Khodorkovskij siga seg bera ótta fyri, at russisku myndugleikarnir ætla at beina fyri honum.

Leonid Nevzlin, Mikhail Brundo og Vladimir Dubov, sum allir eru skuldsettir fyri svik ímóti tí almenna, halda uppá, at Khodorkovskij bleiv tikin, dømdur og settur í fongsul, tí hann var við til at fíggja ta politisku andstøðuna ímóti Vladimir Putin, forseta. Dómurin hevur eisini við svik at gera, siga teir. Teir tríggir flýddu úr Russlandi til Ísraels fyri at sleppa undan rættarsókn. Teir eru av jødiskari ætt, og eftir ísraelskari lóg fingu teir ísraelskan ríkisborgararætt beinanvegin.

Fyri nøkrum døgum síðani frættist, at Mikhail Khodorkovskij er fluttur úr einum fongsli tætt við Moskva, og at hann nú er í einum fongsli einastaðni í Sibir. Hann er dømdur átta ára fongsul fyri skattasvik og annað svik ímóti tí almenna.

## Tiknir fyri krígsbrotsverk

Myndugleikarnir í Bosnia hava tikið tríggjar bosniaserbar, tí myndugleikarnir hava illgruna um, at teir myrdu 19 muslimar undir borgarakrígnum, sum vardi frá 1992 til 1995.

Almenni ákærin í Bosnia sigur við AP, at tað vóru eftir øllum at døma teir tríggir menninir, sum myrdu 19 fólk í muslimska býnum Broko tíðliga í borgarakrígnum. Millum tey myrdu var ein 91 ára gamal maður. Tað er ikki greitt, hvat teir tríggir menninir siga um skuldsetingina.

Serbarnir í Bosnia hava sýtt fyri at samstarva við krígsbrotsmannadómstólin í Haag, og tað hevur millum annað havt við sær, at teir báðir fremstu bosniaserbisku leiðarарnir undir borgarakrígnum, Radovan Karadzic og Ratko Mladic, eru ikki tiknir enn. NATO hevur leitað eftir teimum leingi, men higartil uttan úrslit, og eitt tilboð um eina stóra finningarløn hevur heldur ikki givið nakað úrslit.

## Fólkateljing í Kina

Myndugleikarnir í Kina hava gjørt av at skipa fyri einari fólkateljing, men hon umfatar kortini bara 13 milliónir fólk ella umleið eitt prosent av landsins íbúgvum.

Almenna tíðiondastovan Xinhua skrivar, at myndugleikarnir ætla at telja tey, sum ferðast aftur og fram innanlands fyri at finna sær eitt arbeiði. Hildið verður, at hesi eru umleið 13 milliónir í tali, og ætlanin er at telja fólk í 2.800 býum fyri at finna tey, skrivar Xinhua.

Síðani ta kommunistisku kollveltingina í 1949 hava fimm fólkateljingar verið, sum hava umfatað allar kinesarar. Xinhua skrivar, at í løtuni eru kinesararnir umleið 1,3 milliard í tali.